Støðuroynd f

Navn: _____

Kapitlarnir 19 - 21

Tú skalt einki skriva á uppgávublaðið uttan navnið. Uppgávusvørini skrivar tú fyri seg og letur inn saman við uppgávublaðnum.

nr. 1

Ein genta stendur á skíðum oman eina brekku, hon fer við javnari ferð, $v = 4{,}5\ \frac{m}{s}$.
Rørslan er eftir snórabeinari linju.

a) Hvussu nevna vit slíka rørslu?
b) Hvussu langt fer gentan í 7 sekund?

nr. 2

Ein tyrla hongur still í luftini uppi yvir einum fjallatindi. Ein maður í tyrluni sleppur einum luti, sum í 4 sekund dettur í leysum lofti. Vit rokna ikki við luftmótstøðu.

a) Hvussu nevna vit rørsluna hjá lutinum?
b) Hvussu nógva ferð hevur luturin, tá ið hann brestur í fjallið?
c) Hvussu høgt sveimar tyrlan uppi yvir fjallatindinum?

nr. 3

Ein lutur hevur nøgdina 7 kg. Luturin dettur í leysum lofti so leingi, at ferðin er jøvn.

a) Hvussu stór er acceleratiónin hjá lutinum, tá ið ferðin er vorðin jøvn?
b) Hvussu stór er tyngdarkraftin á lutin?
c) Hvussu stór er endaliga kraftin á lutin, tá ið ferðin er vorðin jøvn?
d) Nevn allar kreftir, sum virka á lutin og sig, hvussu stórar tær eru.

nr. 4

a) Hvussu stórt er tvørmálið í Sólini?
b) Hvussu stórt er tvørmálið í Jørðini?
c) Hvussu stórt er tvørmálið í Mánanum?

Tú kanst velja ímillum svørini høgrumegin.

149,6 mió km.
384 400 km.
12 756 km.
1 391 400 km.
3 476 km.
1,5 mió km.
15 000 km.

nr. 5

a) Hvussu nógvar stjørnur mynda stjørnumerkið Kalsvognin?
b) Hvørjum bókstavi líkist stjørnumerkið Cassiopeia?

nr. 6

a) Sólin er einar 400 ferðir so stór sum Mánin. Kortini eru Sólin og Mánin merkiliga javnstór á luftini. Hvussu kann tað bera til?

nr. 7

a) Nær eru dagur og nátt líka long?

b) Eitt kvøldið kl. 20 hyggja vit at Mánanum og geva okkum far um, hvar hann er á luftini. Lat okkum nevna hetta punktið P. Hvar stendur Mánin á luftini kvøldið eftir kl. 20 sammett við punktið P?

nr. 8

a) Hvat er ein sólarmyrking?

b) Hvat er ein mánamyrking?

nr. 9

a) Hvussu nógvar gongustjørnur ganga um Sólina?

b) Hvussu eitur tann innasta gongustjørnan?

c) Hvussu eitur tann størsta gongustjørnan?

nr. 10

Pluto er uttasta gongustjørnan.

a) Nær varð Pluto funnin?

b) Hvør fann hana?

c) Hvussu leingi hevur Pluto at ganga eitt umfar um Sólina?

d) Hvussu nógvar mánar hevur Pluto?

nr. 11

a) Hvussu nógvar mánar hevur Venus?

b) Hvussu nógvar mánar hevur Mars?

nr. 12

a) Hvat er ein smástjørna?

b) Hvat er ein flogsteinur?

c) Hvat er ein halastjørna?

nr. 13

a) Hvussu eitur kendasta halastjørnan?

b) Nær sást hon á luftini í farnu øld?

c) Nær verður hon aftur at síggja?